# Høgni hevur longu vunnið

**Bardagin móti krabbanum var stóri dysturin. Høgni R. Øster sigur, at hann heldur seg longu hava vunnið, bara hann aftur er partur av oyggjaleikalandsliðnum í fimleiki**

FIGHTARIN
*Jákup Mørk*

At umboða land sítt í altjóða kapping vil altíð vera nakað serligt. Eitt tekin um, at tú ert millum tey allar bestu heima, og at størri og harðari avbjóðingar tí mugu á skránna fyri framhaldandi menningini.

Men hjá Høgna R. Øster spennir hetta longur enn sum so. Fyri bara hálvum øðrum ári síðani var tankin um enn eina oyggjaleikaluttøku í øllum fjarur.

Høgni hevði annars enn einaferð verið partur av føroyska fimleikalandsliðnum, men hóast hann eftir øllum at døma skuldi verið ein ungur maður í framúr venjingarstøðu, so fór orkan so líðandi at bila.

Talan var um blóðkrabba, men hóast lívshóttandi, so megnaði Høgni spakuliga at vinna á hesum. Umframt ynskið um sjálvt lívið, so setti hann sær eisini fyri, at hann enn einaferð skuldi vera við til at umboða Føroyar á oyggjaleikum, og veteranurin á landsliðnum dylir ikki fyri, at hann longu kennir seg hava vunnið, nú fráferðin stendur fyri framman.

- Eg havi so longu rokkið fyrsta málinum. Bara tað at taka lut, er ein stórur sigur hjá mær, og nú skal eg bara gjøgnumføra allar kappingardagarnar.

Tú hevur sjálvur vunnið eitt gullmerki fyri fýra árum síðani. Hevur tú nakrar vónir um tað hesaferð.

- Tað er so ikki nakað, sum eg gangi og rokni við.



*Blóðkrabbin var fyri hálvum øðrum ári síðani um at taka Høgna R. Øster. Tann dystin vann Høgni, og nú er hann enn einaferð til reiðar at tørna út fyri føroyskan fimleik*

Venjingarstøðan er heldur ikki heilt tann sama, sum hon var fyri tveimum árum síðani, tá eg var í Danmark. Reaktiónir og konditión er ikki komin upp á sama støði, og merki tað væl í kroppinum, tá vit hava vant hart.

Men alt hetta kann helst vera tað sama hjá Høgna, tá oyggjaleikirnir eru ígongd. Veteranurin, sum á leikunum verður 33 ár, hevur longu vunnið truplasta dystin, og so er talan um eykavinningar, um gull og heiður enn einaferð verða vunnin á leikunum.

# Hini renna undan okkum

**Eftir gullregn á Man fyri fýra árum síðani, vórðu medaljurnar færri í tali á Guernsey, og kaldi veruleikin er, at framstigini hjá kappingarneytunum henda skjótari, enn tey gera hjá fimleiki í Føroyum**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*



*Rósing Dam*



*Elinborg T. Djurhuus*



*Øssur D. Eiriksfoss*



*Silja Højgaard*



*Sonja Joensen*



*Anita Knudsen*



*Marit Magnussen*



*Helgi Winther Olsen*



*Høgni R. Øster*



*Kristina Toftegaard*

Eftir at hava verið burtur frá í oyggjaleikhøpi í nøkur ár, varð fimleikurin aftur settur á skránna á Isle of Man fyri fýra árum síðani. Og fyri føroysku heiðursmerkjaúrtøkuna er einki at ivast í, at hetta var sannur fongur.

Hóast gullið varð mest sum rænt frá mansliðnum, so var heildarmyndin, at okkara menn og kvinnur í hesum høpinum vóru so væl og virðilga fremst.

Kanska eggjaða hetta eisini hinum londunum at leggja meira í sínum venjingum, og í øllum førum kann staðfestast, at føroyska úrtøkan ikki stóð mát á Guernsey.

Serstakliga Isle of Man, sum við leikirnar fyri fýra árum síðani høvdu eitt sera ungt lið - og framúr góðar nýggjar umstøður - hava síðani tikið seg nógv fram. Og í flestu førum somikið langt, at Føroyar vórðu yvirháláðar.

Men tað merkir tó ikki, at føroysku vónirnar eru heilt ongar undan leikunum hesaferð.

Sterkastu kortini eru Marit Magnussen og Helgi W. Olsen, og hjá teimum er eitt gull-merki avgjørt ein møguleiki. Og ivaleyst eisini eitt krav frá íðkarunum sjálvum.

Og eisini í liðkappingunum munnu útlitini vera á eini leið. Her gjørdust okkara akkurát av stutt til gullið seinast, og so er spurningurin, hvørt tann parturin verður nærri hesaferð.

Undir øllum umstøðum, so eru heiðursmerki nakað, sum kósin skal setast eftir. Men hvussu langt tað røkkur, er so ein onnur søga.